FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 11. oktober 2022
J.nr.: 22/17555-2
Viðgjørt:

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-041/2022 frá Bjørt Samuelsen, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Una Rasmussen, um øktar inntøkur hjá landskassanum og hjálp til familjur í fíggjarligari neyð.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógv meira av mvg er komið í landskassan í ár vegna øktu prísirnar á olju og bensini?
2. Hvussu nógv meira av mvg er komið í landskassan í ár vegna øktu prísirnar á mat- og drykkivørum?
3. Hvussu nógv er inntøka landskassans vaksin av øktum prísum á gerandis-/neyðsynjarvørum sum heild?
4. Arbeiðir landsstýrið við nøkrum ætlanum um at lata hesar øktu inntøkur útaftur til familjur, sum ikki fáa endarnar at røkka saman, tí livikostnaðurin er so nógv øktur?

Til nr. 1, nr. 2 og nr. 3
Hesir spurningarnir kunnu ikki svarast neyvt. Eisini er ógreitt, hvat meinast við *gerandis-/neyðsynjarvørur sum heild*. Uppgerðir eru ikki tøkar, sum vísa inntøkurnar frá meirvirðisgjaldinum býtt á vørubólkar og frádrigið ymiskar frádráttir, til dømis negativu uppgerðirnar, afturbering til kommunur og onnur. Tí kunnu netto-inntøkurnar hjá landskassanum frá meirvirðisgjaldinum ikki gerast upp býtt á vørubólkar.

Tað er rætt, at inntøkurnar hjá landskassanum frá meirvirðisgjaldinum hækka, tá ið prísirnir hækka á brennievni, mati og drykkjuvørum. Tekin eru tó um, at húsarhald hava tillagað sína nýtslu í ár, millum annað orsakað av hækkandi prísunum á brennievni og matvørum. Prísvøksturin innan brennievni og matvørur hevur gjørt, at húsarhald brúka minni av peningi til aðrar vørur og tænastur enn brennievni og matvørur.

Til dømis sæst, at innflutningurin av vørum til beinleiðis nýtslu er bara vaksin 2,7% frá januar til juli í ár samanborið við somu mánaðir í 2021. Leggjast kann afturat, at broytingin er í ársins prísum. Varð broytingin mátað í føstum prísum (nøgdum), hevði óivað verið talan um eina lækking. Lági vøksturin í innflutninginum av vørum til beinleiðis nýtslu í 2022 kann koma av tillagingum í vørugoymslum. Men hann er eisini tekin um, at vøksturin í húsarhaldsnýtsluni er hæsaður av í ár.

Tillagingin í nýtsluni hjá húsarhaldum í 2022 merkir, at landskassin fær færri inntøkur av meirvirðisgjaldinum og øðrum avgjøldum á aðrar vørur. Inntøkurnar frá meirvirðisgjaldinum januar til september í ár eru til dømis vaksnar um 6% samanborið við somu mánaðir í 2021. Í 2021

hækkaðu inntøkurnar hjá landskassanum av meirvirðisgjaldinum omanfyri 11% samanborið við 2020, hóast prísvøksturin var munandi lægri í 2021 enn í ár.

Sambært upplýsningum frá TAKS er inntøkan frá innflutnings-mvg á brennievni (vørunummur 27101241, 27101243, 27101245, 27101247, 27101248) umleið 160 mió. kr. hægri fyrstu 9 mánaðirnar av 2022 samanborið við sama tíðarskeið í 2021. Uppgerðirnar av innflutnings-mvg eru bara tekin um broytingarnar í innflutningsvirðinum og vísa, eins og nevnt omanfyri, ikki netto-inntøkurnar frádrigið ymiskar frádráttir í meirvirðisgjaldinum. Hinvegin eru samlaðu inntøkurnar frá meirvirðisgjaldinum sama tíðarskeið 84 mió. kr. hægri enn í 2021.

Til nr. 4
Landsstýrið og samgongan hava lagt fram uppskot fyri Løgtingið um oljustuðul, sum ætlandi fer at hjálpa fíggjarliga sperdum familjum at rinda fyri útreiðslur av olju til upphiting í ár. Landsstýrið og samgongan hava síðst í september lagt fram uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri 2023. Í sambandi við uppskotið er boðað frá skattalætta til føroysku familjurnar.

Tinganes, 11. oktober 2022

Uni Rasmussen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum